## DAGSINS MEINING

# Krúttunnan Miðeystur

Tað fer ikki dagur, at Miðeystur ikki er á breddanum í heimsins fjølmiðlum. Tíverri ikki fyri tað góða. Stríð og kríggj, hatur og illstøða. Hetta er gerandisdagurin, sum hvønn dag verður varpaður út úr Miðeystri. Her hevur leikað so hart á so leingi, at nú skuldi skuldi man trúð, at tað var nóg mikið. At lóðurið varð uppi og at alt haturið var uppbrúkt.

Veruleikin tykist tó at vera ein heilt annar. Tað er sum um, at Miðeystur kanska meira enn nakrantíð er ein ”tikkandi” bumba. Ein krúttunna. Har bíðað verður eftir, hvør nú skal fara og festa í fjúsið. Og tað eru so sanniliga nógv um boðið.

Hvat vit enn halda og hvønn vit enn halda við, so er tað ein sannroynd, at tað prutlar undir lokinum í ikki bert einum men í fleiri av londunum í Miðeystri.

Støðan í Ísrael/Palestina er sera spent. Hamas, sum vann valið herfyri, vil framvegis ikki viðurkenna rætt Ísraels at vera til. Tað ger sjálvandi, at Ísrael ikki viðurkennur Hamas sum vinnara av valinum og harvið er álvarslig naggatódn komin í eina framtíðar friðartilgongd. Henda nærum ómøguliga støða kann gera, at vit aftur verða vitni til blóðug sjálvmorðsálop á ísraelar. Og tað fer so aftur at føra til ísraelsk álop á palestinsk mál. Sum støðan er nú, so kann alt henda. Tú óttast fyri tí ringasta.

Leita vit so eitt sindur longur eystureftir til Irak, so tykist støðan har eins álvarssom og ómøgulig. Har restar lítið í einum veruligum borgarakríggi millum muslimar innanhýsis, millum Sunni og Shia. Hendir tað so kann hetta fáa eld í alt Miðeystur.

Triðja stríðsøkið finna vit í grannalagnum, í Iran. Eisini her er støðan sera ótrygg, nú Iran noktar fyri at broyta sín kjarnorkupolitikk. Vil illa til so kunnu vit um ikki so langa tíð fáa eina beinleiðis krígsstøðu millum Iran og USA. Nýggi amerikanski sendiharrin í ST gjørdi nú um dagarnar púra greitt, at um Iran ikki broytir kjarnorkuætlanir sínar, so fær tað ítøkiligar avleiðingar. Og tær kunnu bert vera eitt hernaðarligt álop á kjarnorkuannleggini í Iran. Tá fer søgan at endurtaka seg. Tá grannin Irak fyri mongum árum síðani royndi at útvega sær kjarnorku og noktaði fyri at lurta eftir ávaringunum úr USA vóru kjarnorkuvirkini oyðiløgd av ísraelskum bumbum.

Vit eru tí vitni til eina ótespiliga gongd í Miðeystri, har tað kann bresta nær tað skal vera og í fleiri støðum. Hamas sjálvmorðsálop á Ísrael, borgarakríggj í Irak og oyðing av kjarnorkuvirkjum í Iran – hesi eru tikkandi bumburnar í Miðeystri í dag. Tað skal hepni, vit og skil og diplomati at forða fyri, at ein av hesum bumbum ikki brestur. Og hóast tað eydnast at forða ragnarroki í einum av hesum plássum, so er stórur vandi fyri, at bert ein av bumbunum fer av, fer hon at seta eld í hinar. Tað er ongantíð rætt at geva skarvin yvir, at fella í fátt og lata svartskygni taka ræðið. Men í hesum trimum málum tykist svartskygnið vera meira realistiskt enn vónin og bjartskygnið. So ómøgulig tykist støðan.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Svartafjall – ikki Montenegro!

IVAN EGINSSON
Valby



Fyri stuttum bórust tíðindini um, at ein fólkaatkvøða um loysing fra Beograd verður hildin í tí allarsíðsta fyrrverandi jugoslaviska lýðveldinum, ið enn er saman við Serbia í einum ríkisfelagsskapi. Um loysingin og frælsið verða veruleiki, fer hetta sjálvsagt at merkja, at landið gerst meira sjónligt á altjóða pallinum – eins og verður navn tess nevnt í teimum føroysku fjølmiðlunum oftari, enn tað er í dag.

Nógvir føroyingar kalla í dag hetta landið fyri Montenegro. Eg má viðganga, at hetta skurrar illa í oyrunum. Ikki tí, Montenegro er eitt fínt orð í sær sjálvum - hetta er bara so óføroyskt, sum tað kann vera.

Tað áhugaverda við hesum orðinum er, at tað heldur ikki er nýtt í sjálva landinum, ið umrøtt er í hesari greinini. Fólkið har niðri nýtir eina dialekt av serbiskum og kallar land sítt Cerna Gora (ella Tjerna Gora við føroyskari stavseting). Hetta merkir Svarta Fjall. Navnið Montenegro merkir nevniliga just tað sama – Fjall Svarta – men tað er heldur nýtt í teimum latínsku málunum, til dømis í italskum. Tey latínsku málini eru als ikki tosað millum fólk í tí umrødda landinum. Umvegis italskt og latín er navnið Montenegro onkursvegna komið í enskt og danskt – og nú eisini føroyskt.

Føroyingar siga til dømis Fílabeinsstrondin – og hetta er eisini tað rætta føroyska navnið fyri afrikanska landið. At kalla Svartafjall á føroyskum ”Montenegro” er akkurát tað sama, sum at siga og skriva á føroyskum ”Ivory Coast” (enskt) ella ”Costa d'Avorio” (italskt) – og ikki Fílabeinsstrondin. Vónandi skilja tey flestu hesa samanberingina.

Eg fari við hesum at heita á Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetrinum, eins á teir føroysku fjølmiðlarnar, at nevna tað nýggjasta frælsa evropeiska landið (um loysingin frá Serbia verður gjøgnumførd) Svartafjall (óbundið) ella Svartafjallið (bundið) ella Svartfjallaland, um føroyingar vilja nýta føroysku týðingina av navni landsins – ella Tjerna Gora, um føroyingar velja at kalla landið á upprunamáli tess – men ikki Montenegro! Íbúgvar og borgarar í landinum skulu eitast á føroyskum svartfjallafólk (svartfjallamaður, svartfjallakvinna) ella tjernogorar – ikki montnegrinar, montenegarar ella kanska montenekarar…

Tað er annars altíð áhugavert at lesa stuttar og greiðar viðmerkingar hjá Eyðuni á Borg um málfrøðisligar spurningar í føroyskum. Eg vil takka honum og eisini Johnny Thomsen um seinastu viðmerkingar teirra viðvíkjandi føroyskari stavseting av landinum Ukraina – har má ein viðurkenna, at Johnny hevði rætt. Navnið Ukraina er tó neyvan komið beinleiðis úr donskum – danir skriva nevniliga Ukraine, meðan Ukraina ljóðar heldur meira føroyskt, umframt at tað eisini er nýtt í teimum slavisku málunum.

# Ukreinsk málrøkt

### Ukreina, ikki Ukra-ine!

EYÐUN Á BORG



Í okkara fótbóltsbólki er eitt land, sum eitur Ukreina (appilsingul kollvelting)!

Ein ukreini býr í Ukreina; hann er ukreinskur og tosar ukreinskt!

Í Bretlandi siga tey Júkreyn, í Noregi og Svøríki siga tey Ukreina, men í Føroyum eru nógv, sum siga Ukra-ine! Hví? Jú, tí danir siga tað! Ukra-ine (ella Ukra-ina) er ikki rættur føroyskur framburður (úttala)!

Altso: UKREINA, sum tað stendur á tí føroyska landakortinum!

Meira um landanøvn seinni!

E.S! Er tað langt síðani, tú hoyrdi orðið, stadigvekk?

*eydun.a.borg@skulin.fo*

# Tað eru ikki leirvíkingar sum krevja

ALFRED OLSEN
Løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin



**Í kjakinum um eina atknýtta verkætlan frá Norðoyatunlinum gjøgnum Leirvík, verður Leirvíkar bygdaráð og fólkið í Leirvík framstillað sum tey, ið seta órímilig krøv, men hetta er beinleiðis skeivt, tí veruleikin er tann, at tað er Løgtingið sum hevur játtað og samtykt at tunnil skal gerast undir Leirvík.**

Hin 4. mars 2002 legði táverandi løgmaður, vegna Vinnumálastýrið, uppskot um Norðoyatunnilin fyri løgtingið. Hin 15. mars 2002, var uppskotið samtykt. Tá vóru atknýttar verkætlanir í Leirvík og í Klaksvík tengdar uppí og skuldu hesar gerast í samráð við Leirvíkar- og Klaksvíkar kommunur.

**Leirvík og Klaksvík**
Hin 19. februar 2003, leggur Bjarni Djurholm uppskot nr. 69/2002 fyri løgtingið, sum sigur, at “tá forkanningar og projektering eru gjørdar av atknýttum verkætlanum, skal landsstýrismaðurin leggja fram uppskot til løgtingslóg um hesar verkætlanir. Uppskotið skal fevna um ein tunnil undir Leirvík Eysturoyarmegin og um ein veg frá Oyravegnum yvir í ætlaðu rundkoyringina Borðoyarmegin” og hetta uppskotið var samtykt hin 4. apríl 2003, við 22 atkvøðum.

Sostatt eru tað ikki leirvíkingar sum eru komnir við kravi um ein tunnil, men hetta eru samtyktir, sum Løgtingið gjørdi í 2002 og 2003.

**Tórshavnar kommuna.**
Nú boðar so LV frá, at verður kravið eftirlíkað og tunnil gjørdur í Leirvík, so eru tað fleiri kommunur sum koma at krevja tað sama, millum aðrar Tórshavnar kommuna. Um hetta er lagnurnar speiðsemi veit eg ikki, men atkvøðugreiðslan í Tinginum hin 4. apríl 2003 vísir, at verandi borgarstjóri í Havn var millum teirra, sum samtyktu at tunnil skuldi gerast í Leirvík.

**Landsstýrismaðurin.**
So nú má Bjarni Djurholm kennast við sítt egna uppskot um tunnil í Leirvík, sum nú hevur funnið sína endaligu linjuføring við tunli og atknýttum vegagerðum, og koma við uppskotið um hesa loysnina í Tingið 4. apríl 2006, so ferðslan frá Norðoyatunlinum, fer eftir verandi bygdavegnum gjøgnum Leirvík í so stutta tíð sum gjørligt.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.